# Ársaðalfundur

## í P/F Suðuroyar Sparikassa

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Suðuroyar Sparikassa mikudagin 29. mars 2023 kl. 16.00 á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Suðuroyar Sparikassa, Vágsvegur 60, Vágur.

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.

2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.

3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum.

4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunsins at tilnevna ein nevndarlim sambært § 14.
   *Suðuroyargrunnurin hevur boðað frá, at hann fer at tilnevna Annu Borg Dahl, løgfrøðingur, ráðgevi í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Mækjugøta 19, 100 Tórshavn, sum nevndarlim.*

5. Val av nevndarlimum.
   *Rúni Joensen stendur fyri vali sambært § 14, stk. 2, og § 21, stk. 4 í viðtøkunum. Nevndin mælir til, at Rúni Joensen verður afturvaldur.*
   *Sambært § 14 í viðtøkunum mælir nevndin harumframt til, at nevndin verður víðkað við einum aðalfundarvaldum nevndarlimi soleiðis, at tað verða íalt 6 limir í nevndini harav íalt 5 verða valdir av aðalfundinum.*
   *Um aðalfundurin tekur undir við uppskotinum um at víðka nevndina við einum aðalfundarvaldum nevndarlimi mælir nevndin til, at Niels Johannesen, maskinmeistari og verkfrøðingur (BSc in Marine Engineering), lærari á Vinnuháskúlanum, nevndarformaður í P/F Farcod, P/F Enniberg, P/F Havborg og P/F Ametyst umframt nevndarlimur í P/F S. M. S., Pætursgøta 13, 188 Hoyvík, verður valdur í nevndina.*

6. Val av grannskoðan.
   *Nevndin mælir til afturval av verandi uttanhýsis grannskoðara, Sp/f NUMO, góðkent grannskoðanarvirki.*

7. Uppskot frá nevndini:
   Nevndarsamsýning 2023:
   *Nevndin mælir til, at samsýningin til nevndarlimir felagsins verður óbroytt galdandi fyri 2023 soleiðis, at aðalfundurin viðtekur at samsýningin til nevndarlimir felagsins fyri 2023 verður latin samsvarandi samsýningar politikki felagsins frá mars 2022, við støði í hesum:*
   - *Grundsamsýning: 60.000 kr.*
   - *Nevndarformaður: 2 x grundsamsýning*
   - *Næstformaður: 1,5 x grundsamsýning*
   - *Aðrir nevndarlimir: 1 x grundsamsýning*

   *Fyri eykaarbeiði, í grannskoðanarbólkinum ella serligar nógvar nevndarfundir, kann veitast ein eykasamsýning.*

8. Ymiskt
   Fyri at hava rætt til at møta á aðalfundinum skulu partaeigarar, fólk við fulltrú og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi fríggjadagin 24. mars 2023 hava boðað felagnum frá luttøku á deildum felagsins í Vági ella í Tórshavn.

Rætturin hjá einstøku partaeigarum felagsins til at luttaka á aðalfundinum og at greiða atkvøðu verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum viðkomandi partaeigarar eiga mikudagin 22. mars 2023.

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva skrivliga fulltrú. Fulltrúarskjal er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins.

Skjal at nýta í samband við møguliga brævatkvøðu er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins. Um so er, at tygum ynskja at geva brævatkvøðu skal brævatkvøðuskjalið vera móttikið á høvuðsskrivstovu felagsins í seinasta lagi mikudagin 29. mars 2023 kl. 13.00.

Grannskoðaða ársfrásøgnin kemur saman við dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum at liggja frammi á høvuðsskrivstovu felagsins í Vági í seinasta lagi 2 vikur fyri aðalfundin.

P/F Suðuroyar Sparikassi
Nevndin

ANNIJANNI